**Semingsuppskot**

Uppskot til semju millum:

**Starvsfelagið**

**og**

**FMR / KAF**

Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið, eru vorðin samd um at gera hesar broytingar í sáttmálan, ið var galdandi til 30. september 2021.

**§ 1**

**Sáttmálaskeið og lønarhækkan**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2021 til 30. september 2024.

- Tann 1. januar 2022 hækka lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækka lønirnar á lønarstigunum 1-20 við kr. 740 og á lønarstigunum 21-50 við kr. 540.
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,75%

## Broytingar í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið

**Havstovan, arbeiðsklæði**
Havstovan letur dekkarum kr. 2.500 (við mvg) um árið til váttaðar útreiðslur til keyp av arbeiðsklæðum.

**Havstovan, samsýning til at flyta skipið § 44**
§ 44 stk. 3 verður broytt. Flytan av skipinum verður lagt afturat:

Verður manningin boðsend til arbeiðis í frítíð, t.d. tá ið skipið er til umvælingar og eftirlit, skal flytast ella fyri manglandi avspákan, smbr. § 42, stk. 2 og 3, verður yrkadagar goldin yvirtíðarløn 1, og sunnu- og halgidagar yvirtíðarløn 2.

**Havstovan – avtala um arbeiði umborð á Jákup Sverra**
Tá starvsfólk á Havstovuni, ella frá øðrum almennum stovnum, eru við rannsóknarskipi, fáa tey (tó ikki stovnsleiðarin) hesa samsýning:

1. Fyri hvønn dag umborð verður veitt ein upphædd, sum er 4% av lønini í 26 lønarflokki á 1. Stigi eftir lønartalvuni hjá tænastumonnum landsins. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai. Henda samsýningin er umframt ta vanligu lønina, sum starvsfólkini fáa sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.
2. Fyri at vera við fremmandum skipi (t.e. ikki rannsóknarskipi), verður fyri hvønn dag umborð veitt ein upphædd, sum er 4,5% av lønini í 26. lønarflokki á stigi 1 eftir lønartalvuni hjá tænastumonnum landsins. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai. Henda samsýningin er umframt ta vanligu lønina, sum starvsfólkini fáa sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.
3. Fyri hvønn leygardag og fyri hvønn sunnudag umborð verður veittur ein dagur frí í landi.
4. Fyri skeivar halgidagar fáa starvsfólk sama yvirtíðargjald sum dekkarar á rannsóknarskipinum, tá tey eru við hesar dagar. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai.

**Strandfaraskip Landsins, meirarbeiðsviðbót í §54**
Alt stk. 3 verður strikað

**Strandfaraskip Landsins – Nýtt stk. 2 í § 51.**
Vaktargjald sambært § 25 verður eisini latið tá serligar umstøður gera, at skipsleiðslan krevur, at manningin er umborð um náttina, t.d. orsaka av illveðri.

**Sjúkraflutningstænastan - halgidagar**
Halgidagarnir í arbeiðstíðaravtalulni hjá sjúkraflutningstænastuni verða broyttir soleiðis, at teir framyvir verða teir somu sum í sáttmálanum hjá Starvsfelagnum.

**Sjúkraflutningstænastan - arbeiðstíðaravtalan**
Galdandi arbeiðstíðaravtala verður sett inn í sáttmálan.

**Sjúkraflutningstænastan - protokollat um arbeiðstíðaravtaluna**
Arbeiðsbólkur við umboðum frá sáttmálapørtunum og sjúkrahúsverkinum verður settur at endurskoða arbeiðstíðarreglurnar. Arbeiðið byrjar í januar 2022 og skal verða liðugt á sumri 2022. Verður úrslitið kostnaðarneutralt, kann tað koma í gildi í sáttmálaskeiðinum. Bera broytingarnar hinvegin kostnað við sær, verður uppskotið partur av komandi samráðingum.

**Sjúkraflutningstænastan - sektiónir**
Hospitalssektiónir og rættsligar sektiónir verða samsýndar við 15 normal tímum út frá lønarstig 2 í 4. lønarflokki.

**Sjúkraflutningstænastan - umflokking av viðgerum**
Viðgerar í 3. lønarflokki verður umflokkaðir til 4. lønarflokk. Treyt fyri at verða flokkaður í 4. lønarflokki er, at portørurin hevur lidna útbúgving sum viðgeri (ambulancebehandler).

JN

**Sjúkraflutningstænastan - umflokking av vaktleiðarum**
Vaktleiðarar í 5. lønarflokk verða umflokkaðir til 6. lønarflokk.

Yvirflytingin verður sambært sáttmálanum, soleiðis at viðkomandi verður løntur eftir nærmasta hægri lønarstigi í nýggja lønarflokkinum. Starvsfólkið varðveitir sín verandi starvsaldur.

## Broytingar í sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið

**§5 Fyribilsstørv og avloysarar**
Nýtt stk. 3: Avtalur um fyribilsstørv, avloysarar og onnur størv, ið eru avmarkað í tíð, skulu vera nágreiniligar og skrivligar. Avtalur skulu vera gjørdar við starvsfólkið áðrenn setanin byrjar. Verandi stk. 3 og 4 verður eftir hetta stk. 4 og 5.

**§10 Frítíð**
Nýtt stk. 5: Frá 1. apríl 2022 verða 12% í frítíðarløn av gjøldum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í grunn, um so er at gjaldið fyri ólagaliga arbeiðstíð ikki verður latið í feriuni.

**§20 Sløkkiliðsfólk**
Galdandi frá 1. oktober 2021:
"Stk. 1. Sløkkiliðsfólk fáa vaktargjald, sum er 20% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3, 1 stig (stig 7).

Galdandi frá 1. oktober 2022:
"Stk. 1. Sløkkiliðsfólk fáa vaktargjald, sum er 22% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3, 1 stig (stig 7).

Galdandi frá 1. oktober 2023:
"Stk. 1. Sløkkiliðsfólk fáa vaktargjald, sum er 24% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3, 1 stig (stig 7).

**Protokollat viðv. § 20 um sløkkiliðið**
Partarnir eru samdir um at hyggja at vaktarskipanini hjá sløkkiliðsfólkum, harundir innihaldinum í arbeiðinum í vaktini.

Partarnir kanna eisini um samsýningin til sløkkiliðsfólk sambært § 20, stk. 1 er tíðarhóskandi m.a. við at kanna møguleikan við stigvíst at fara frá verandi skipan til at fylgja vanligu reglunum um vaktargjald sambært § 30 í sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá sáttmálapørtunum verður settur at kanna vaktararbeiðið hjá sløkkiliðsfólkunum. Arbeiðið byrjar í september 2022 og skal verða liðugt á sumri 2023.

JN

**§ 26 Serstøk eykagjøld á SEV**
Eykagjaldið fyri arbeiðið úti á spennum § 26, stk. 1 fer úr 300 kr. upp í 395 kr.
Eykagjaldið fyri arbeiðið uppi í 60 kV mastrum § 26 stk. 2 fer úr 20 kr. upp í 30 kr. um tíman.
Dagføringin av eykagjøldunum fær gildi frá 1. apríl 2022.

**§ 29 Sjálvboðið eyka arbeiði**
Broytt stk. 1: Eitt nú tá ið arbeiðspláss er undirmannað í samband við langtíðarsjúku, barnsferð ella feriu og tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, liggja og bíða, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði.

Nýtt stk. 2, 3, 4 og 5: Stk. 2. Sjálvboðið eyka arbeiði kann eisini vera tá ið starvsfólkið av egnum ávum ynskir sær eitt hægri tímatal enn avtalað er í setanaravtaluni. Bæði fólk í fullum starvi og parttíðar sett kunnu átaka sær sjálvboðið eyka arbeiði.

Stk. 3 Sjálvboðið eyka arbeiði verður avtalað millum starvsfólkið og arbeiðsplássið. Avtalurnar skulu vera skrivligar og skulu vera gjørdar í góðari tíð, áðrenn eykaarbeiði byrjar. Starvsfólkið kunnar álitisfólkið um einstøku avtaluna.

Stk. 4. Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin má vera í minsta lagi tímalønin + vaktargjald II. Tó má hon ongantíð vera hægri enn yvirtíðargjald 2.

Stk. 5. Sjálvboðið eyka arbeiði má bert vera avmarkaða tíð. Álitisfólkið skal verða kunnað um í hvønn mun sjálvboðið eyka arbeiði verður avtalað.

**§ 41 Praktikantar**
Stk. 2., upphæddirnar hækka: Starvsfólk, ið hevur ábyrgdina av praktiktíðini hjá einum lesandi, fær eina praktikkvegleiðaraviðbót. Hevur viðkomandi starvsfólk, nomið sær praktikkvegleiðaraútbúgving, er viðbótin kr. 1.500,00 um mánaðin og fyri tann, ið ikki hevur nomið sær hesa, er viðbótin kr. 1.200,00 um mánaðin, meðan viðkomandi hevur praktikant.

## Broytingar í sáttmálunum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Fíggjarmálaráðnum við Starvsfelagið

**§ 22 stk. 9 um yvirarbeiði (§ 27 hjá KAF)**
Lagt verður afturat:
Fyri stig 28 og hægri verða niðan fyri standandi reglur galdandi.
Fyri drúgt álagt yvirtíðararbeiði galda hesar reglur:

1) Yvirtíðararbeiðið kann bara vera eftir vanliga arbeiðstíð.
2) Samsýning fyri drúgt yvirtíðararbeiði verður einans veitt, um yvirtíðararbeiðið er álagt og tímanýtslan er undir eftirliti.

JN

3) Drúgt yvirtíðararbeiðið skal verða gjørt upp einaferð um mánaðin, ella eftir avtalu, t.d. pr. ársfjórðing ella tá ið ein áløgd uppgáva er liðug.
4) Drúgt yvirtíðararbeiðið skal sum meginregla verða frígingið. Eru tímarnir ikki frígingnir, tá ið næsti ársfjórðingurin er av, skulu teir verða útgoldnir. Í serligum førum, tá ið báðir partar eru samdir um tað, kunnu tímarnir verða fluttir, men tó ongantíð meiri enn 12 mánaðir.
5) Drúgt yvirtíðararbeiði skal verða frígingið 1 til 1,5. Tímalønin fyri útgoldnar yvirtíðartímar er 150% av tímalønini.
6) Teir fyrstu 20 áløgdu yvirtíðartímarnir hvønn ársfjórðingin eru tó samsýntir í lønini.

**§ 28 stk. 3 um skeiðsluttøku (§ 33, stk. 3 hjá KAF)**
Broytt stk. 3:
Samsýnt verður fyri ferðatíðina til skeiðsstaðið (uttanbíggja), um talan er um ferðing sjóvegis, ið varðar longri enn ein tíma. Samsýnt verður ikki, um ferðatíðin ikki er longri enn ferðatíðin vanliga er frá heimi til vanliga arbeiðsstaðin. Samsýnt verður í mesta lagi fyri 4 arbeiðstímar. Ferðing í bili verður roknað í skeiðstíðina.

**Protokollat um arbeiðsbólkar**
§ 21 í sáttmálanum við KAF og áseting í flokkingaravtaluni hjá Fíggjarmálaráðnum:
Møguligar avtalur um arbeiðsbólkar, sum verða avtalaðar í semju, verða framyvir ásettar í serstakari avtalu, og tí verða ásetingarnar um arbeiðsbólkar strikaðar úr sjálvum sáttmálanum.

Hetta protokollat frá undanfarnum semjum stendur við:
Partarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at kanna møguleikan fyri endurskoðan av bygnaðinum av lønartalvuni, og avleiðingarnar av hesum.

**Protokollat um felags evnisdag um førleikamenning**
Sáttmálapartarnir eru samdir um at skipa fyri felags evnisdegi, har ljós verður varpað á tøkniligu frambrotini, sum Talgilding Føroya hevur staðið fyri við menningini av talgildum tænastum. Harundir avleiðingarnar tøkniliga menningin hevur havt á arbeiðið hjá alment og kommunalt settum starvsfólkum.
Ljós skal eisini varpast á møguleikan hjá arbeiðsgevarum at seta í verk førleikamenning, m.a. tá starvsfólk hava tørv á upplæring og dagføring fyri frameftir at umsita tøkniligu skipanirnar o.a.

**Protokolat um álitisfólkaskipanina og dátuverndarlógina**
Partarnir eru samdir um, at FMR / KAF orða vegleiðingar sum nágreina virksemið hjá álitisfólki í mun til dátuverndarlógina, herundir t.d. brúk av arbeiðsteldupostí og dátuábyrgd. Hesar vegleiðingar verða sendar felagnum til ummælis.

JN

§2

*Gildi og uppsøgn*

Gildi sáttmálans

Stk. 1. Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2021. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2024. Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.

Tórshavn, tann 13. januar 2022

Fyri **Starvsfelagið**

*Súni Selfoss, formaður*

*Anna Johannesen, felagsskrivari*

*Noomi K. Rasmussen, næstforkvinna*

*Hilmar Augustinussen, nevndarlimur*

*Birita Kjærbæk, nevndarlimur*

*Borgný Mohr, nevndarlimur*

Fyri **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

*Pauli Trond Petersen, formaður*

*Anita Fuglø,* *leiðari*

*Per Martin Gregersen, næstformaður*

Fyri **Fíggjarmálaráðið**

*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður*

*Jan Mortensen, lønarstjóri*